

www.oljan.fo

**Jan Müller** 23 - 03 - 2013

# Norðmenn útseta oljuleiting við Jan Mayen

Norski olju- og orkumálaráðharrin, Ola Borten Moe, hevur gjørt av, at Oljustýrið skal fáa betri tíð til at kanna umstøðurnar við Jan Mayen, og avgerðin ber í sær, at oljuleitingin við oynna samstundis verður útsett. -Eftir ætlanini skuldi Stórtingið taka støðu til oljuleiting við Jan Mayen fyri summarfrítíðina, men nú verður tað ikki fyrr enn seinni, sigur ráðharrin við Stavanger Aftenblad. Felagsskapir fegnast Umhvørvisverndarfelagsskapirnir eru fegnir um avgerðina at bíða við oljuleiting við Jan Mayen. -Hetta er ein ávegis sigur fyri ta viðbreknu náttúruna kring Jan Mayen. Vit hava alla orsøk til at stúra fyri, at oljutilbúgvingin ímóti dálking verður ongantíð nóg góð til eina leið, sum er so langt úr landi, og sum hevur so baldrut veðurlag, sigur Lars Haltbrekken hjá Naturvernforbundet við blaðið. Hann vísir á, at leiðin við Jan Mayen hevur stóran týdning fyri sjófugl og havsúgdjór so sum kóp og hval. Norska veðurlags- og dálkingarstýrið, Klif, er ímóti oljuvinnu við Jan Mayen. Grundgevingin er, at oyggin er friðað, og at umhvørvið í sjónum har er viðbrekið. Stjórin í Klif, Ellen Hambro, segði við kringvarpið NRK fyri stuttum, at hendir eitt óhapp við Jan Mayen, fer tað at taka alt ov langa tíð at fáa tilbúgvingarútgerðina fram. Tí helt hon, at tað rætta er at skipa eina serliga tilbúgving á oynni, men ásannaði, at tað kann nevan gerast uttan at órógva tað friðaða økið, sum umfatar næstan alla oynna. Tey fyrstu kanningarúrslitini av Jan Mayen-leiðini benda á, at har eru millum 90 og 460 milliónir rúmmetrar oljuekvivalentar í undirgrundini. Men fyribilskanningarnar vísa eisini, at tað er ivasamt, um hydrokarbonir verða funnin í økinum, sigur olju- og orkumálaráðið í Oslo í einari fráboðan.